




## KEÐILIG MET

*Ein umfatandi kanning vísir, at føroyingar eru evropameistarar í høgum prísum. Tað bæði rekur fólk av landinum og forðar útisetum í at flyta heim, sigur Heri á Rógvi, búskaparfrøðingur, sum hevur gjørt kanningina*

og samfelag.

Men hann staðfestir eisini, at í grundini vita vit ómetaliga lítið um støðuna hjá hvørjum einstøkum samfelagsbólki.

– Vit vita lítið um, hvussu livikorini eru hjá einstøkum bólkum, og hvussu væl ymsir samfelagsbólkar yvirhøvur eru fyri. Tí eiga vit at brúka kanningina sum grundarlag undir víðari gransking um hetta sama evni, og somuleiðis brúka hana sum grundarlag fyri at kanna, hvørjir viðurskifti ávirka ymsar bólkar í samfelagnum.

– Men samstundis eiga vit eisini at brúka hana sum ein liður í at gera okkum meiri tilvitað um, hvussu vit bera okkum at, sum brúkarar. Helst skuldi endin verðið, at vit øll ásanna tað, at hetta hevur áhugan hjá okkum øllum somlum, tí verður príslegan lækkað, verða vit øll ríkari, sigur Heri á Rógvi.

aki@sosialurin.fo

## Keypiorkan minkar enn meir

Hesi seinastu árini, er keypiorkan hjá føroyingum vaksin.

Tað staðfestir Heri á Rógvi, búskaparfrøðingur, í kanningini, hann hevur gjørt um prísleguna og lønarlagið í Føroyum og í Danmark.

Hann hevur roknað seg fram til, at síðani 2001 eru lønirnar hækkaðar góð 25% og prísirnir eru hækkaðir góð 16%.

Hinvegin er nýtslan søguliga lág í løtuni og prísvøksturin er at kalla ongin.

Men nú eru útlit til, at prísurin fer at hækka. Kortini verður ikki mett, at talan verður um nakran ógvusligan vøkstur, kanska eini 2%-3%.

Hesum er als onki óvanligt í. Haraftur ímóti verður ikki mett, at rentan fer at hækka nakað nevnivert hesi næstu tíðina.

Men tað er samstundis greitt, at hækka lønirnar ikki samsvarandi, fer keypikraftin at minka.

• FRAMHALD Á NÆSTU SÍÐU